gult30 cyan30 magenta30 svart30



# TILTØK

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnukvøldið kl. 17.30 bønarløta, kl. 18 møti v/ Christian Joensen og Birgit Andersen.
Mánakvøldið kl. 20 ungdómsmøti – seinasta áðrenn summarfrítíðina.
Mikumorgunin kl. 07 bønarløta. Heimasíða okkara: www.koma.fo

**Norðstreymoy**
Aglow fundur verður í Glæmuni í Kvívík leygarkvøldið 23. juni kl. 20. Allar kvinnur og menn hjartaliga vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.

**Vestmanna Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Niels Jacob Nielsen, trúboðara.

**Filadelfia, Sundalagið**
Í annaðkvøld kl. 18 kvøldmøti v/ Sonna Djurhuus.

**Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 møti. Øll eru vælkomin.

**Ørkin, Saltangará**
Evangel. møti verður sunnudagin kl. 17 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini, Saltangará, við Frítór Debes. Húsmøti verður týskvøldið kl. 19 hjá Maybritt og Trúgva Berg, Søldafjørður. Verið hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 22 ungdómskvøld.
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús við Maibritt og Súsonnu. Sunnudagin kl. 11 morgunmøti við Paula Høj. Barnamøti kl. 11. Um viðrar, verður farið samkomuútferð við morgunmøti sunnudagin. Havið okkurt drekkandi við sjálvi. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Í samband við at tað er seinasta ungdómsmøti áðrenn summarfrítíðina verður skipað fyri grillkvøld leygarkvøldið kl. 20.00 – um viðrar. Øll eru hjartaliga vælkomin við.
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli og kl. 19 møti.

**Soli Deo Gloria**
Fríggjakvøldið kl. 21 Opið hús. Leygarkvøldið kl. 20 møti. Sunnukvøldið kl. 18 møti, Anfinn Eliasen og vinfólk úr Århus eru við til øll trý møtini. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður í Bøgøtu 3 fríggjakvøldið 22. juni kl. 20, allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnukvøldið kl. 19 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur, kl. 21 útifundur um viðrar.
Ónsdagin kl. 20 bønar- og uppbyggingarfundur.

**Missiónshúsið í Vági**
Onki møti sunnukvøldið. Týskvøldið kl. 20 bønarmøti við Rómb. 7. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 13-15.00 á tlf. 212380.

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 25. juni:*
kl. 9.45-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-12 Prát um »Dagur í viku« ið verður 20.8.-24.8. 2001.
kl. 15.30 **Almennur fundur.** Hvat skal/kann Tjarnagarður (Marinustøðin) nýtast til? **Øll hugskot eru vælkomin**. Nevndin, ið arbeiðir við Tjarnagarði verður við.
*Týsdagin 26. juni:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 **Fyrireiking til Ólavsøku.**
*Mikudagin 27. juni:*
kl. 10-12 Fyrireiking til døgurðan
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Vit vitja lívsverkið á Ternuryggi hjá sambýlinum á Bóndaheyggi – Jarvin F. Hansen, sigur frá. Tilm. mánadag. tlf. 316491
*Hósdagin 28. juni:*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11-17 Opið hús
*Fríggjadagin 29. juni:*
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Vága Gongufelag**
Um viðrar verður útferð til Mykinesar sunnudagin 24.06. kl. 10.30 av Sørvági. Havið góð gonguklæðir við. Tilmelding er neyðug, prísur fæst við tilmelding. Ferðavinnan í Vágum, tlf. 333455/213455.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Leygarmorgunin kl. 9-10 roykfríur fundur.
Fundir verða leygardagin kl. 17.00-18.00, sunnudagin kl. 11.00-12.00 og mánakvøldið kl. 20.00-21.00.

**AA-kvinnufundur**
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Opin AA-kvinnu fundur í Havn sunnukvøldið kl. 20.

## PRÓGV

Eyðun Poulsen, Fuglafjørður, hevur lokið prógv sum El-installatør á EUC-Syd í Sønderborg.

Petur F. Johannesen, ættaður av Skála hevur fingið prógv sum maskinmeistari.

Fríða Johannesen, ættað úr Fuglafirði, hevur fingið prógv usm ergoterapeut.

Edvard Mikkelsen, Skipanes, búsitandi í Svøríki, hevur lokið útbúgving sum maskinmeistari við universitetið í Kalmar.

John Mikkelsen, Skipanes, hevur lokið útbúgving sum El-installatør frá EUC-Syd, Sønderborg.

Helgi Winther Olsen, Tórshavn, hevur tikið studentsprógv á 4-ára Team Danmarks gymnasiumí Nørre Sundby.

## 90 ÁR

Í dag, 23.6. verður Ingrid Olsen, Skála, 90 ár. Hon er at hitta heima í dag frá kl. 14-17.

## GULLBRÚDLEYP

Í dag 23. juni kunnu hjúnini Hallgerð og Frits Jacobsen í Sørvági halda gullbrúdleyp. Tey eru burturstødd.

## BRÚDLEYP

Í dag 23. juni kl. 16.00 giftast Vesturkirkjuni Rannvá Lómstein, Tórshavn og Karstin Zachariasen, Hestur. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.30.

Í dag 23. juni kl. 18.00 giftast í Glyvra kirkju Hildur L. Hansen og Fróði M. Davidsen, bæði úr Saltangará. Veitslan verður fyri innbodnum í Kvinnufelagshúsinum.

Í dag 23. juni kl. 14.30 giftast í Fuglafjarða kirkju Fríðbjørg Hjelm og Erling Joensen, bæði úr Fuglafirði. Veitslan verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

Í dag 23. juni kl. 16.00 giftast í Glyvra kirkju Turið Müller, Saltangará og Arngrímur Arngrímsson, Hafnafjørður. Veitslan verður fyri innbodnum í Ólastovu í Saltangará kl. 19.00.

Leygardagin 30. juni kl. 14.00 giftast í Havnar kirkju Katrin Niclasen og Bogi Jacobsen.

Leygardagin 7. juli giftast í Sjóvar kirkju Marta Tonnysdóttir Thomsen, Strendur og Sámal Joensen, Norðragøta. Brúðarveitslan verður hildin í bygdarhúsinum á Strondum kl. 19. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 447089 ella 441408 innan 30. juni.

Fríggjadagin 13. juli kl. 17.00 giftast í Leirvíkar kirkju Ann-Mari Heinesen, Leirvík og Jan E. Petersen, Klaksvík. Veistlan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, vera vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 443254, 456480 ella 252070 áðrenn 2. juli.

Leygardagin 14. juli giftast í Vesturkirkjuni Durið Hansen og Hans Kristian Joensen, bæði úr Havn. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið, verða biðin at siga frá á tlf. 319170 ella 214929 innan 7. juli.

Hósdagin 19. juli kl. 18.00 giftast í Havnar kirkju Ingunn Ósk Eiriksdóttir, Lopra og Heini Weihe, Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í Havnar klubba kl. 19.30.

Hósdagin 19. juli giftast á ráðhúsinum í Hirtshals Ansa Nystrøm og Arnold Mortensen, Klaksvík. Brúdleypið verður hildin á Malta, Vinkelvej 2 í Hirtshals. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 10. juli á tlf. 455954 ella 0045 98945460.

Leygardagin 21. juli giftast í Hvalbiar kirkju Elisabeth Norðberg Eið, Hvalba og Svein Eliasen, Tórshavn, búsitandi Viborg. Brúdleypið verður hildið í Roynhøllini kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at ringja tlf. 319917, 375295 ella 0045 87254758 innan 5. juli.

Leygardagin 21. juli kl. 12 giftast í Vesturkirkjuni Sára Skylv Reinert, Tórshavn og Arngrím Sigurd Thomassen, Sandavágur. Brúðarveitslan verður hildin í SÍF-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 332775, 313009 ella 0045 98389554 innan 11. juli.

Leygardagin 21. juli kl. 17.00 giftast í Sørvágs kirkju Tordis Nielsen, Sørvágur og Kim Lorenzen, Sønderborg. Tey, ið ætla at gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin at siga frá innan 7. juli á tlf. 332149 ella 321464.

Leygardagin 21. juli kl. 17.00 giftast í Havnar kirkju Katrin Bonde og Poul Kjartan Festirstein. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 312218, 316976 ella 318133 áðrenn 10. juli.

Leygardagin 21. juli kl. 15.00 verða Rakul Dam og Rói Lindberg gift í Havnar kirkju. Brúdleypsveitslan verður í Róðrarneyustinum á Argjum kl. 19.00. Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin at siga frá áðrenn 12. juli á tlf. 316402 ella 313074.

Fríggjadagin 27. juli kl. 16.00 giftast í Funnings kirkju, Beinta Sivertsen, Funningur og Páll Hammer, Runavík. Brúdleypsveitslan verður í bygdarhúsinumí Leirvík kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. nr. 449440 ella 424555 innan 9. juli.

Leygardagin 4. august kl. 15.00 giftast í Tvøroyrar kirkju Mariann Øster, Tvøroyri og Romicá Pascu, Craiova, Rumenia. Veitslan verður í Ítróttarhøllini í Trongisvági kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum á hesum stóra degi, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 371194 ella 371094 áðrenn 21. juli. Til ber eisini at senda teldupost til moester post.olivant.fo

Leygardagin 4. august kl. 15.00 giftast í Sjóvar kirkju Karina Simonsen, Strendur og Svend Højgaard, Skála. Brúdleypið verður í Høllini á Skála kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 226508 ella 224591 innan 22. juli.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Muður mælir tað, sum hjartað er fult av«.*
Matt. 12. 24b

»Ikki tað, ið fer inn í munnin, ger menniskjuna óreina; men tað, ið fer út úr munninum«.

Tað, ið hjarta er fylt av, tosar muðurin. Hvat tosa vit um? Tað finnast menniskju, sum altíð bara tosa um seg sjálvan: gomul, um teirra sjúkur og veikleikar; ung, um teirra tráan og girndir; foreldur, um teirra serstøku, frálíku børn… Hjørtu teirra eru fylt av teirra egna. Nakað gott og uppbyggjandi er tað ikki at vera saman við slíkum menniskjum.

Tað eru onnur, hvørs hjarta er fylt við óreinsku. Muður teirra flýtur yvir við ljótum, spillandi orðum. Tey eru ein pláta fyri teirra umvhørvi. – Uppaftur onnur duga bara at tosa um prís og skatt, um ítrótt og politik ella bara um mat og mótar. Hjarta teirra er fylt af lutum úr tí dagliga degnum. Og aftur onnur eru meistarar í at bera lygnir og slatur húsanna millum. Tala teirra avdúkar hvussu ússaligt hjarta teirra er.

Men um hvat tosaðu Jesu lærusveinar hin fyrsta páskamorgun? Teir tosaðu við hvønn annan um tær stórhendingar, ið Guð stóð aftanfyri: Um krossin og um upprisn Jesu – eitt uppbyggiligt samtaluevni. Í Lukasar evangelium stendur um, at meðan lærustevinarnri tosaðu um alt hetta, stóð Jesus sjálvur mitt ímillum teirra og sigur við teir: »Friður verið við tykkum«. Lærusveinarnir vóru menniskju sum vit. Tað, ið var at gera í gerandisdegnum nam eisini teir. Men tað gekst teimum, sum honum, ið ferðast á nátt, hann frøðist yvir størnurnar. Brádliga rennur sól í eystri, og so hava stjørnurnar ongan týdning. Tá ið tað, sum Guð hevði gjørt, gjørdist teimum týðiligt – tá ið Jesus, krossfestur av menniskjum, men nú risin upp, kom inn í lív teirra, tá var alt hitt ringa, alt sjálvsøkni, allir óndir tankar burtur, av tí bjarta ljósinum. So varð tað hann, ið fylti hjørtu teirra.

»Men tað, ið fer út úr munninum, kemur frá hjartanum og ger tað menniskjuna óreina«, sigur Jesus um ta menniskju í hvørs hjarta, hann ikki hevur bústað.

Títt tós avdúkar hvør býr í hjarta tínum.

**John S. Myllhamar, trúboðari**

gult31 cyan31 magenta31 svart31



**VBA**
Reinsaríið, Tórsgøta 5: (Vaksin børn hjá alkoholikarum) ella ørkymlandi familjuumstøður. Opin fundur sunnudag kl. 17.

**AA-fundur í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19 – (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Javni**
Skrivstovan er stongd vegna summarfrí. Ringjast kann til ein av nevndarlimunum.
Eirikur Dam, tlf. 422087
Jógvan Elias á Løgmansbø, tlf. 317686
Jarvin Feilberg Hansen, tlf. 320237
Malena Arnholdsdóttir, tlf. 441395
Diana í Puntabyrgi, tlf. 316510 – fax 310557
email: punta@post.olivant.fo

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn**
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin mánadag kl. 14-18 og hósdag kl. 14-20. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**Kvinnuhúsið svarar alt samdøgrið**
á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**KRIS í Føroyum**
Ráðgevingar og viðtalu telefonin er nú opin hvørt mánakvøld og hóskvøld á tlf. 458181 frá kl. 20-22. Møguleiki er eisini fyri at skriva beinleiðis til felagið á adressu: KRIS í Føroyum, boks 345, 700 Klaksvík.

**Amnesty International**
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

**Føroyskir fiskimenn**
uttanlands, tlf. 21 04 95. Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**MBF-skrivstovan**
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail: mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Viðtala við sosialráðgevan fæst eftir avtalu við skrivstovuna á tlf. 317373.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.-olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo


Nýggj útbúgving

FRAMLEIÐSLUTØKNINGUR
Yrkisakademiútbúgving

Útbúgvingin tekur 2 ár og fevnir m. a. um
- kunningartøkni
- maskinkonstruktión
- framleiðslutøkni
- framleiðslustýring
- virkisleiðslu

Upptøkukrøv
- handverkaraútbúgving í viðkomandi yrki
- studentsútbúgving
- atstøði
- H I F
- H H
- H T
- H F

Útbúgvingin byrjar í august 2001.
Umsóknarfreistin er 25. juni 2001.

Nærri upplýsingar um útbúgvingina og umsóknarbløð fáast við at venda sær til skúlan.

TEKNISKI SKÚLIN TÓRSHAVN
Marknagilsvegur 75 · Postsmoga 239 · FO-110 Tórshavn
Telefon + 298-31 19 57 · Telefaks + 298-31 66 21
tst@tst.fo · www.tst.fo






Hús í Danmark til sølu

Hesi sera spennandi húsini við stórum nýgjørdum hava, við innigyrdum svimjihyli verða seld, innbúgvið kann fylgja við.

Húsini eru 130 m² og hava 3 kømur, stovu við brenniovni, køk, baðirúm við gosbaði, vaskirúm , 50 m² úthús/garaga, 12 m² gestahús við soviplássi.

Grundstykkið er uml. 1.000 m².

Húsini standa sera væl fyri í Varde, Jylland, uml. 1 tíma frá Lego-land og Løveparkini, 15 min. frá Vesturstrondini, 15 min. frá Esbjerg.
Prísuppskot: 995.000 Kr.

Tlf. 322 999 fartlf. 225 345



Sosialurin
Lesið Sosialin – tað loysir seg



UPP & AFTURLATINGARTÍÐIR

Svimjihøllin verður opin allan dagin í summarfrítíðini, undantikið mikudag og sunnudag, frá mánad. 25/6-2001 til leygard. 11/8-2001





Tíðirnar eru hesar:

| | |
|---|---|
| Mánadag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Týsdag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Mikudag | kl. 06:45 - 09:00 |
| Hósdag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Fríggjadag | kl. 06:45 - 20:00 |
| Leygardag | kl. 09:00 - 17:00 |
| Sunnudag | kl. 08:00 - 10:00 |
| & | kl. 14:00 - 17:00 |

SVIMJIHØLLIN Í GUNDADALI
Hoydalsvegur 21 • Tel 311550



HAVNAR BIO
Tlf. 3119 56





Leygardagin 23.06. kl. 23[30]
Sunnudagin 24.06. kl. 22[30]




Leygardagin 23.06. kl. 20[45]
Sunnudagin 24.06. kl. 19[45]




Leygardagin 23.06. kl. 23[00]
Sunnudagin 24.06. kl. 22[00]




Leygardagin 23.06. kl. 20[30]
Sunnudagin 24.06. kl. 19[30]


☆ BIO ☆ KIOSKIN
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.

www.in.fo/havnarbio